Familjan bjálvar seg út

HEIMAÍDNA‹UR.
Eftir eina baldruta byrjan eru karmarnir skaptir fyri einum vøkstri í føroyskum pappírsídna›i. Familjufyritøkan Tonito á Ei›i brynjar seg út til tann endaliga bardagan um brævbjálvarnar

OR›: DÁNJAL HØJGAARD

MYNDIR: JENS KR. VANG

Í RÚTINUM: *Fe›garnir Niels Emil og Gunnar taka ímóti, tá i› rútakonvoluttarnir koma rullandi inn vi› flutningsbandinum. -Brævbjálvar eru virusfríir, reklamera teir vi› einum skálkabrosi*

Hon sær ikki so ræ›andi út. Tann 25 ára gamla Winkler&Dunnebier maskinan, sum stendur og buldrar mitt í maskinhøllini. Fær teg kanska heldur at hugsa um vættrajól og hugnaligu prentsmi›juna hjá Gamla Bókhandli enn um eitt alvaldandi ídna›arvirki.

Men hon má ikki undirmetast.

Winkler&Dunnebier koyrir sum ein røvari, og hvønn einasta minutt, hon stendur har og stunar, sp‡tir hon út 200 brævbjálvar um minuttin til tann føroyska heimamarkna›in.

Ta› gevur 5 milliónir brævbjálvar um ári›.

Winkler&Dunnebier er hjarta› í føroya einasta brævbjálvavirki. Familjufyritøkuni Tonito á Ei›i, sum framlei›ir 75 prosent av øllum brævbjálvum, sum ver›a brúktir í Føroyum í dag.

Ein risi í føroyskum høpi. Men ein pinkuligur sammett vi› útlendsku kappingarneytarnar.

Sjálvbjarnir menn

Søgan byrjar í gó›u gullasjtí›ini, tá alt bar til.

Ei›isbrø›urnir og bilmekanikararnir, Niels Emil og Thorleif høvdu havt bilverksta› saman í nógv ár, og nú droymdu hesir sjálvbjargnu menn um at stovna egi› ídna›arvirki.

Júst hvat teir vildu framlei›a, var ikki greitt beinanvegin. Men ta› skuldi so vera okkurt, sum føroyingar brúktu ríkiliga nógv av. Tí greitt var, at 45.000 fólk er ein ógvuliga lítil markna›ur.

-Vit vildu gjarna finna upp á okkurt. Ta› liggur líkasum í. Vit hava altí› arbeitt sjálvstø›ugt, sigur Niels Emil.

-At ta› júst bleiv til brævbjálvar – ja, ta› var tí, at hetta var ein framlei›sla, sum øll brúka rættiliga nógv av, sigur hann.

Saman vi› pápa teirra Gunnari leiga›u Ei›isbrø›urnir seg inn í ein goymslubygning hjá SEV uppi á Grind á Ei›i. Keyptu eina gamla brævbjálvamaskinu, og fóru í holt vi› at gera teir fyrstu føroysku brævbjálvarnar.

Ári› var 1988.

Gott fyri landi›

Í maskinhøllini hevur Winkler&Dunnebier veri› í svingt sí›ani klokkan 8 í morgun.

Í vestara endanum er ein stór pappírsrulla fest á maskinuna, ha›ani pappíri› ver›ur ført i inn í maskinaríi›. Maskinan sker brævbjálvarnar til, fó›rar teir innan, klínir latex-sevju á endarnar, so at teir vera sjálvklistrandi – og límar til endans brævbjálvarnar saman.

Vi› eystara endan stendur 80-ára gamli Gunnar so hugagó›ur og tekur ímóti teimum lidnu brævbjálvunum. Her á Tonito gera maskinurnar ta› tunga arbei›i›, og Gunnar, sum er gamal sjóma›ur frøist um at sleppa at standa turrskøddur á tí reina og nossliga hallargólvinum.

-Her sleppur tú frá at ganga í oljuklæ›um, sigur hann læandi, og stappar eitt bunti av brævbjálvum í pappeskjuna.

-Eg havi naka› at fara upp til um morgunin. Eg fylti 80 í fjør, og hetta heldur lívi› í mær, sigur hann, me›an hann leggur brævbjálvarnar pent í pappeskjurnar, so at teir eru klárir at avskipa.

Gott er at eiga sítt egna, heldur Gunnar. Men Tonito ger eisini landinum eina stóra tænastu, skundar hann sær at leggja afturat.

-Hetta er vi› til at halda samfelagshjólunum malandi. Ta› er jú minst líka t‡dningarmiki› at tálma innflutningin sum at menna útflutningin, minnir hann á.

Trupul byrjan

90-ini vóru ein hør› roynd fyri ídna›arvirki› á Ei›i.

Samstundis sum eftirspurningurin eftir brævbjálvum sveik skuldi virki› knappliga læra seg at kappast á jøvnum føti vi› teir stóru kappingarneytarnar úti í heimi. Tá Tonito byrja›i kundu rávørur til ídna›arframlei›slu í Føroyum - so sum pappír - nevniliga flytast inn so at siga uttan toll. Hetta gav ein stóran kappingarfyrimun mótvegis teimum innfluttu brævbjálvunum, sum lógu undir høgum tolli.

Men so smekka›i ES nevan í bori› og kravdi javnstø›u. Og tá MVG-skipanin var sett í verk fyrst í 90-unum hvarv tann kappingarfyrimunur, sum føroysku ídna›arvirkini høvdu havt.

-So tú kanst siga, at ljósi› brann í bá›um endum, minnist Niels Emil.

At virki› á Ei›i kortini hóra›i undan komst fyrst og fremst av teirri sannroynd, at Tonito er ein familjufyritøka vi› stóra F.

-Høvdu vit ikki veri› ein familjufyritøka, so hev›i ta› aldrin gingi›, sta›festir Niels Emil, sum heldur, at fortí›in hevur veri› teimum ein læra.

-Vit hava lært, at ta› ræ›ur allatí›ina um at gerast betri. Vit kunnu altí› gera ta› betri. Virki› er blivi› meira rasjonelt, og í dag er ta› minni, i› fer til spillis.

Altí› til arbei›is

Tá klokkan er 12 kemur Thorleif í maskinhøllina at avloysa pápan, so at hann kann sleppa til hús at fáa sær døgver›a. Maskinurnar ganga allar tí›ir á degnum og spyrja ikki eftir matartí›unum, og tí noy›ast teir at avloysa hvønn annan.

Vanliga arbei›a teir minst til klokkan 6 á kvøldi. Kemur ein gó›ur snarordi, ella er ta› upp undir jól sleppa teir kanska ikki til hús fyrr enn klokkan 10 á kvøldi. Og ta› hendir seg meiri enn so, at vikuskifti› eisini má offrast.

-40 tíma arbei›sviku – nei, ta› kenni eg bestemt einki til, sigur Torleif turrisliga.

-Ta› hev›i neyvan bori› til um vit ikki vóru ein familjufyritøka. So høvdu vit veri› noyddir at goldi› d‡rar yvirtímar, sta›festir hann, me›an hann fyllir brævbjálvar í eskjurnar.

Men júst ta›, at Tonito er ein lítil og smidlig familjufyritøka gevur fyritøkuni ein kappingarfyrimun, sum eigararnir fegnir reklamera vi›:

-Skjót leveransa er okkara stóra styrki. Vit kunnu levera 50.000 brævbjálvar eftir einum degi. Ringir ein fyritøka t.d. til okkum ein fríggjadag seinnapart, so kunnu vit hava fleiri hundra›túsund brævbjálvar klárar mánamorgunin, sigur Niels Emil, sum bed‡rar, at føroyska virki› er kappingarført í prísi.

-Føroyingar eru ikki sinna›ir at gjalda naka› eyka fyri føroyskar vørur - og solei›is skal ta› eisini vera. Tí mugu vit allatí›ina vera kappingarførir í prísi, slær hann fast.

Seinasti fjó›ringurin

Í fjør summar flutti Tonito inn í ein spildurn‡ggjan virkisbygning vi› havnarlagi› á Ei›i. Umframt sjálva maskinhøllina eru skrivstova og kaffistova í bygninginum, sum kosta›i umlei› eina millión. Ta› er ljóst og arbei›sligt inni og dupult so nógv pláss sum í gamla virkisbygninginum uppi á Grind.

Eftir eina baldruta byrjan í føroyskum vinnulívi› eru karmarnir nú skaptir fyri einum vøkstri í føroyskum pappírsídna›i. Lítli Dávid á Ei›i bjálvar seg út til tann endaliga bardagan móti útlendska Goliat, sum framvegis situr á fjó›ringinum av føroyska brævbjálvamarkna›inum.

Ein fjó›ringur, sum er gull verdur.

Hetta kemst av, at ta› eru nógvir smærri brúkarar – bæ›i stovnar og virkir – sum enn n‡ta útlendskar brævbjálvar. Og teir smáu ordrarnir geva lutfalsliga meira í kassan.

Endurn‡gging alney›ug

Tískil er Tonito nú - fyri fyrstu fer› í 12 ára søgu virkisins - í holt vi› at markna›arføra teir føroysku brævbjálvarnar.

-Higartil hava vit rætt og slætt ikki havt orku at reklamera fyri framlei›sluni. Nú hava vit fingi› karmarnar, sum skulu til fyri at skapa ein vøkstur í framlei›sluni, sigur Niels Emil.

Næsta stigi› er at útvega virkinum n‡ggjari og betri maskinur, og kanska ver›ur tørvur á fleiri starvsfólkum. Undir øllum umstø›um er greitt, at skal Tonito hava ein livandi kjans móti teimum stóru so má virki› megna at endurn‡ggja seg, ásannar lei›slan.

-Okkara kappingarneytar úti í heimi eru stórar fyritøkur, sum hava rá› at endurn‡ggja seg. Spurningurin er í hvønn mun vit klára at endurn‡ggja okkum, tí trupulleikin er at avlopi› er ov líti›, sigur Niels Emil.

-Ta› er hatta vælsigna›a skiftisavlopi›, suffar eigarin, sum ikki vil avdúka hvussu úrtsliti› hjá Tonito sær út.

Fyribils hevur familjufyritøkan á Ei›i i› hvussu er ongar ætlanir um at útflyta føroyskar brævbjálvar.

-Ta› ræ›ur fyrst og fremst um, at gera okkum eitt sindur betri her heima. Ta› er tó ikki óhugsandi, at vit einafer› fara at útflyta brævbjálvar. Um so er ver›ur ta› ikki til Evropa, men heldur til Íslands, sigur Niels Emil.

Alneti› ska›ar ikki

-Vit hava einki merkt til at sølan er minka›. Tvørturímóti halda vit okkum hava merkt eina positiva ávirkan, sigur Niels Emil Andreasen, eigari í Tonito.

Grundarlagi› undir virkseminum hjá Tonito eru tey stóru arbei›splássini í landinum – bæ›i almennir stovnar og privatar fyritøkur. Og líkt er til, at teir stóru brúkararnir framvegis dúva upp á brævbjálvarnar í sínum dagliga samskifti vi› vi›skiftafólkini.

Ein av kundunum hjá Tonito er Føroya Tele. Ta› er ein sannroynd, at alneti› hevur givi› telefonverkinum fleiri brúkarar, og hesir brúkarar skulu hava rokningar, sum ver›a sendar í føroyskum brævbjálvum.

-At telefonverki› er byrja› eina n‡ggja tænastu merkir, at fleiri rokningar skulu sendast út. Teir hava fingi› fleiri kundar - og ta› merkja vit, sigur hann.

Leysasølan í handlunum er ikki nøkur t‡›andi inntøkukelda hjá Tonito. Tískil hevur ta› minni t‡dning fyri virki›, um Palleba og Marsanna leggja av at skriva brøv, tí at tey hava fingi› alnet.

FOKUS

Tonito

Ídna›arvirki á Ei›i, sum hevur gjørt brævbjálvar til føroyska markna›in sí›ani 1988. Eigarar eru Ei›isbrø›urnir Niels Emil og Thorleif Andreasen og pápi teirra Gunnar Andreasen. Navni› Tonito er stytting av fornøvnunum Thorleif, Niels og hjá svogri teirra Tordi (Niclasen), sum var vi› í fyrstani.

Helt til í leiga›um hølum tey fyrstu árini. Flutti í egnan virkisbygning vi› havnalagi› á Ei›i, summari› 1999.

Framlei›ir 5 milliónir brævbjálvar, i› svarar til uml. 75 prosent av føroyska markna›inum. Uml. 15 sløg av brævbjálvum.



Frá vinstru: Niels Emil, Gunnar og Thorleif